## DAGSINS MEINING

# Ódámligt hulduspæl við landsins ognum

Nakrir huldumenn eru í loyndum farnir at leggja ætlanir um tveir berandi stólpar í føroysku fiskivinnuni – Fiskasøluna og Fiskavirking. Hetta spælið í loyndum fer fram, uttan at leiðslurnar í hesum feløgum vita nakað stórvegis um ætlanirnar. Og landsstýrismaðurin í vinnumálum er bara leysliga kunnaður, sigur hann.

Men tað loyva vit okkum at ivast í. Letur hann ikki bara sum um hann einki veit? Er kanska talan um onkran politiskan tvangstanka – kanska eina ætlaða privatisering – nakrar fáar mánaðir undan einum møguligum stjórnarskifti í landinum?

Veit landsstýrismaðurin einki um ætlanirnar hjá Framtaksgrunninum, sum eigur Fiskavirking og Fiskasøluna, er spurningurin álvarsamur og prinsipiellur, tí leiðslan í Framtaksgrunninum er jú bara tann longdi armurin hjá landsstýrismanninum! Hinvegin hava vit áður sæð, at embætismenn í Vinnumálastýrinum hava stoypt hugsjónarligar ætlanir, sum eru víttgangandi og borgarligar so tað forslær.

Vit hava nú havt eina rættiliga støðuga javnvág – stabilitet – í føroysku fiskivinnuni við rættiliga góðum úrsliti. Men slíkt hulduspæl, sum nú er komið undan kavi, er alt annað enn gagnligt. Hesi ódámligu »signal« hava longu elvt til afturljóð úr útlondum. Fólk í útlendskari fiskivinnu spyrja longu nú, hvat hendir í Føroyum. V.ø.o. er hulduspælið hjá Framtaksgrunninum – og kanska eisini Vinnumálastýrinum – signal um óstabilitet og meira ella minni totaliter fyribrigdi!

Enn vita vit so lítið um hulduspælið hjá Framtaksgrunninum og Vinnumálastýrinum. Men gitt verður, og tað skilst av nógvum brøgdum, at Fiskasølan og Fiskavirking skulu leggjast saman. Fyribils eru nevndirnar samskipaðar, men tað løgna er, at bara ein nevndarlimur í gomlu nevndini hjá Fiskasøluni er í tí nýggju samskipaðu nevndini. Henda nýggja nevnd hevur fingið ein nýggjan formann, stjóran í Formula, sum eisini eigur Vestmanna Timburhandil og sum eisini er nevndarformaður í Kalli, óivað óførur, men eingin sigur seg av álvara kenna henda mann, sum knappliga verður tikin fram at stjórna »lokomotivinum« í føroyska búskapinum! Virkar tað álitisskapandi? Skuldi hann ikki havt arbeitt seg upp í skipanini, og hvør er grundgevingin fyri at seta ein løgfrøðing og ikki ein persón við fiskivinnuútbúgving ella búskaparfrøðing?

Verða Fiskavirking ella Fiskasølan løgd saman í eina risastóra fyritøku – ein mastodont – fer tað óivað at elva til órógv í fiskivinnuni. Sum er selja fleiri privat fiskavirki gjøgnum Fiskasøluna. Hvussu verður, tá tann nýggja fyritøkan – fiskavirkis-sølufyritøkan – bæði skal kappast um ráfisk við onnur virki, og samstundis skal selja fyri hesi virki?

Í hesi atløgu skulu vit ikki koma inn á ætlanir ella møguleikar at privatisera Fiskasøluna ella Fiskavirking. Vit kunnu bara staðfesta, at í løtuni fer eitt ódámligt og ófrættakent hulduspæl fram við landsins ognum – við ognunum hjá tær og mær – samstundis sum fólksins tænari – landsstýrismaður – bara er kunnaður! Hvat er á vási og verða atgerðirnar framdar, tí tað stendur so illa til hjá Fiskasøluni og Fiskavirking?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landssjúkrahúsið flutt inn á Eirargarð 16

**Helena og Hanus Samuelsen**
*Í Hoyvík 17. nov. 2001*

So hendi tað aftur. Landssjúkrahúsið, sum kom inn á Eirargarð 14 við eini sjúkradeild, er nú eisini flutt inn á 16. Nú eru tvær sjúkradeildir á Eirargarði 14-16, ið eru samanbygd hús.

Dóttir okkara hevur búð á Eirargarði 16 síðan 1980, tá hetta hús var bygt at hýsa fólki, ið tørvaði pedagogiska hjálp og stuðul. Tað er so løgið, at sjúkrahúsið flytur inn á somu adressu, og eingin spyr tey, ið búgva har frammanundan, um onnur kunnu koma inn til tey at búgva. Vóru tey spurd, áttu vit at vita tað, tí dóttir okkara er ómyndug-gjørd, so vit eru ikki bara hennara foreldur, men eisini hennara verjar.

Nú spyrja vit, hvør hevur ábyrgdina av tí, sum hent er:
landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum?
sjúkrahússtjórin/-leiðslan?
stjórin fyri serforsorgini?
onnur?

Til kunningar: Sjúkradeildin, ið var tikin í nýtslu nú, 15. nov. 2001, er í sunnara enda á Eirargarði 16B norður, sum er heimið hjá 5 fólkum.

Og vit spyrja, hvør okkara er so hjartagóður, at hann hevði loyvt gjøgnumgongd til sjúkradeild ígjøgnum sítt heim dag og dagliga og fleiri ferðir um dagin? Hetta er tað, sum verður álagt teimum at tola, sum ikki eru før fyri at mótmæla.

Hans Dalsgaard, sáli, gjørdi einaferð eina yrking, tá hann helt toruna ganga ov nær. Yrkingin ljóðar:

*Meg hugbítur mangan,*
*at her kom ein profetur*
*í Jeramiasar líki,*
*við hevjaðum hondum*
*og logandi eygum,*
*at skelka samvitsku teirra,*
*ið gloyma skaparans minstu –*
*sum siga í háfloygdum røðum,*
*til handaklapp*
*og hurrá:*
*»Tað er ikki produktivt,*
*at byggja borgir*
*til býtt børn.«*

Ár 2001 verður »borgin« tikin frá teimum. Tey 15 fólkini kunnu nú flýggja saman. Hvar skulu tey fara?

# Góði Johan Dahl…

**Ólavur Rasmussen**



Tað er við vilja, eg skrivi hesa viðmerking eftir fólkatingsvalið. Í Sosialinum, dagfest 17. november 2001, skrivar tú eina agitatiónsgrein, ið ber heitið: Í hjørtum okkara býr frælsi… Í hesi grein skýrir tú undirritaða – og øll onnur tjóðveldisfólk, umframt sjálvstýrisfólk í Fólkaflokkinum – fyri at vera nazistar ella nationalsosialistar.

Sjálvur havi eg verið prestur í Norðurtýsklandi ella Suðurslesvík og stóri hópurin av teimum gomlu sóknarbørnunum hjá mær vóru offur fyri Hitlerstýrinum í Týsklandi.

Eg havi kent og jarðað nógvar gamlar týsk/danska vinmenn, sum hava sitið í týskari fangalegu, og sum vóru merktir á lív og sál av hesum upplivingum. Felags fyri teir allar var, at teir vóru góðir við Danmark og ta donsk/norðurlendsku hugsjónina um demokrati, meðan teir ræddust tankan um, at ein statur tekur kvørkratak um ein annan stat og eitt annað fólk – sum er eyðkent fyri nationalsosialistiska hugburðin.

Góði Johan Dahl. Vit hava øll loyvi til at vera ósamd um eina sak. EIisni ríkisfelagsskapin. Vit eru øll eins góðir føroyingar hvørt vit vilja loysing ella samband. At skýra tíni mótstøðufólk nationalsosialistar er líka so nógv burturvið, sum tað hevði verið av mær at skýrt teg ein quisling. Vit liva í einum demokratiskum landi og eiga at duga at vera ósamd um eina sak – og at virða tað, at onnur fólk hugsa øðrvísi enn ein sjálvur.

Um tú innihaldsliga hevur so lítið at borðreiða við politiskt, at tú ikki megnar annað enn at samanbera tíni mótstøðufólk við nazismu og talebanismu, so hevur tú ikki nóg nógv argument fyri tínum egna politikki. So ansa eftir eina aðru ferð ikki at lata kenslurnar fara avstað við tær, men nýt vit og skil, tí tað hevur tú ovmikið av.

Loksins eitt sindur av suðuroyarhumor í sárið: Um tær manglar argument fyri at vera sambandsmaður ert tú vælkomin at ringja til mín!!!

## Gamla Sjálvstýri

Tann aktuella støðan í (Elli)gamla Sjálvstýrinum kann samanfatast í hesi lítlu yrking:

Formansvalið hevði skund
Helena fær ei í eyguni blund
hatar Sámal Petur í Grund
heldur hann vera ein dumman hund

*Heilsan*
**Heri Eysturlíð**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Byggja út í Havn fyri 84 milliónir næsta ár

**Næsta ár skulu stórar útbyggingar gerast í høvuðsstaðnum, men tað verður tann bleyti pakkin, sum fer við teimum størstu upphæddunum**

TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*

Næsta ár skulu útbyggingar gerast í Tórshavnar Kommu fyri 84 milliónir krónur.

Hetta sæst á fíggjarætlanini, sum Býráðið hevur til viðgerðar.

Fíggjarætlanin skal verða liðug í hesi vikuni og í kvøld fer Býráðið at leggja seinastu hond á hana, áðrenn hon verður send Landsstýrinum til góðkenningar.

Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu verður næsta ár upp á 406,5 milliónir.

### Byggja út fyri 85 milliónir

Tað nógva av útreiðslunum eru ásettar við lóg.

Men ætlanin er eisini at gera rættiliga stórar útbyggingar í høvuðsstaðnum næsta ár.

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at ætlanin er at byggja út fyri góðar 84 milliónir í Havnini næsta ár. Av teimum er ætlanin at byggja Tórshavnar Havn út fyri góðar 20 milliónir, men hinar 64 milliónirnar fara til aðrar útbyggingar í kommununi.

Sostatt er útbyggingarkvotan, sum Tórshavnar Kommuna hevur fingið frá landsstýrinum næsta ár, spent á tamb.

Útbyggingarkvotan hjá Tórshavnar Kommunu er upp á 75 milliónir næsta ár.

Men av tí, at Landsstýrið góðkennur, at bara helvtin av havnarútbyggingum verða taldar uppí, skulu bara helvtin av teimum gott 20 milliónunum, sum skulu brúkast upp á Tórshavnar Havn, teljast við og sostatt gongur roknistykkið akkurát upp.

Jan Christiansen sigur, at tað, sum serliga krevur stórar útbyggingar í Tórshavnar Havn, er, at tvey, stór, nýggj ferðamannaskip fara at sigla á Havnina næstu árini, í 2003 kemur nýggj Norrøna og í 2004 kemur eisini nýggjur Smyril og tí er tað neyðugt at byrja upp á útbyggingarnar beinanvegin.

Annars krevur Býráðið, at Landsstýrið betalir tann partin av havnaútbygginini, sum krevjast fyri at Smyril skal kunna leggja at.



*Havnin stendur í stórum vøkstri og tað setir stór krøv. Eitt nú verður neyðugt at byggja skúlar fyri 200-300 milliónir tey komandu árini, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri*

### Ein bleytur pakki

Borgarstjórin, at nú, karmarnir eru lagdir fastir, skal kommunan undir arbeiðið at raðfesta tær útbyggingar, sum skulu gerast.

Tí er tað ikki endaliga gjørt av, hvat tær gott og væl 64 milliónirnar, sum annars eru settar av til útbyggingar, skulu brúkast til.

– Men tað er í øllum førum greitt, at ein munndi partur av teimum skulu brúkast til at byggja skúlar fyri.

– Nýggja skúlalógin setir sera stór krøv til skúlahøli og tí er tað alneyðugt at leggja stóra orku í tað arbeiðið.

Jan Christiansen sigur, at Tórshavnar Kommuna noyðist at brúka einar 200-300 milliónir tey komandu árini til skúlarnar í býnum.

– Neyðugt er at byggja nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum. Men harumframt er tað eisini neyðugt at byggja bæði skúlan á Argjum, í Kollafirði og í Kaldbak, umframt Kommunuskúlan og Eysturskúlan, munandi út og at gera ábøtur á teir.

Men somuleiðis er tað esini greitt, at ein munandi upphædd skal brúkast til at byggja barnaansingarstovnar næsta ár.

Sostatt er tað tann "bleyti pakkin", sum verður rættiliga stórur komandi ár.

### Ringveg og vatngoymslu

Umframt hetta, er tað neyðugt at byggja nýggja, stóra vatngoymslu í Kollafirði í sambandi við uppsjóvarvirkið, sum verður bygt har, tí tað krevur sera nógv vatn.

Og afturat tí er tað neyðugt at halda fram við Marknagilsvegnum út á Argir.

Somuleiðis skal ein ytri ringvegur gerast av Sandvíkahjalla, úr Hvítanesvegnum við Brennistøðina, omanfyri allan býin, heilt yvir í Oyggjarvegin, har Meinhardt Arge selir bilar.

Hetta er eitt arbeiði sum er mett at kosta næstan 50 milliónir og tað skal gerast tey næstu fimm árini.

Men hetta er partvís landsvegur og tí er avtala gjørd við Landsstýrið um at betala helvtina av tí.

Næsta ár er ætlanin at Kommunan skal seta fýra milliónir av til hetta arbeiðið og so fimm milliónir um árið tey næstu fýra árini. Landsstýrið skal so seta somu upphædd av.

– Hetta eru stórar upphæddir, men tær eru neyðugar fyri at spjaða ferðsluna, tí sum er, verður øll ferðslan, sum gongur inn í Havnina, kroyst oman í býin og tað taka vegirnir ikki ímóti, sigur borgarstjórin.

# Skattaprosentið í Havn lækkar ikki

**Næsta ár verður skattaprosentið í Havn óbroytt, men minnilutin í Býráðnum vil hava barnafrádráttin hækkaðan**

TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*

Næsta ár verður skattaprosentið í Havn tað sama, sum tað er í ár, tvs 18,75%.

Tað er greitt, nú Býráðið leggur seinastu hond á fíggjarætlanina fyri komandi ár.

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at Havnin stendur í sera stórum vøkstri og tí stendur á at fylgja við at byggja skúlar, vegir, barnaansing og alt annað út, sum krevst fyri at kunna hýsa øllum hesum fólkunum.

Harumframt hevur Býráðið sett sær fyri at gera eitt ordiligt hál fyri at fáa skuldina hjá kommununi niður.

Næsta ár er ætlanin at betala 18 milliónir í avdráttum, men harumframt koma so 16 milliónir í rentum. Sostatt skal kommunan betala 34 milliónir næsta ár í rentum og avdráttum.

Í ár hevur kommunan betalt 20 milliónir í avdráttum

Næsta ár fer skuldin hjá kommununi sostatt beint niður um 200 milliónir og tað er minni enn ein hálv álíkning, tí komman fær 400 milliónir inn í skatti

Sostatt er kommunan rættiliga væl fyri í so máta og tað gevur henni eisini eitt størri, fíggjarligt frælsi.

### Hækka barnafrádráttin

Á býráðsfundi herfyri boðaði minnilutin frá, at sum heild tók hann undir við fíggjarætlanini fyri komandi ár.

Minnilutin tekur eisini undir við, at skattaprosentið skal vera óbroytt. Minnilutin er samdur í, at tað er óráð at lækka skattin, samstundis sum kommunan hevur lutfalsliga stóra skuld at dragast við og samstundis sum stórar uppgávur liggja fyri framman at loysa

Hinvegin eru minnilutin og meirilutin ikki samd um, hvussu stórur barnafrádrátturin skal vera komandi ár

Meirilutin mælir til at varðveita barnafrádrattin upp á 3.500 krónur fyri hørt barn undir 18 ár, men minnilutin mælir til at hækka hann 500 krónur, upp í 4.000 krónur fyri hvørt barn.



*Minnilutin í Tórshavnar Býráð skjýtur upp at seta eina vitjunartænastu á stovn fyri eldri, har sjúkrasystir vitjar heima hjá teimum eina ella tvær ferðir um árið at vita, hvussu til stendur*
*Savnsmynd*

Á Býráðsfundi herfyri, upplýsti Leivur Hansen, at hetta fer at kosta kommununi 2,7 milliónir.

Minnilutin mælir eisini til at seta 400.000 krónur av til eina vitjunartænastu til eldri fólk.

Hann helt, at ein stór kommuna sum Havnin, eigur at hugsa nógv um tey eldru og at veita teimum eina hjálpandi hond. Hetta var eisini í samsvari við eldrarálitið hjá Býráðnum um eldrapolitikkin í kommununi tey komandu árini

Á býráðsfundi herfyri greiddi Elin Lindenskov frá, at hetta er ein skipan, har sjúkrasystir eina ella tvær ferðir um árið kann fara heim til øll yvir 75 ár at kanna heilsustøðuna.

Hon heldur, at hetta kann hava eina stóra fyribyrgjandi ávirkan, so at ymsir trupulleikar verða uppdagaðir so tíðliga sum gjørligt.